*Bretskt designering í kjalarvørrinum á nýggjum oljufundi:*

# Oljufeløgini sleppa nú út í Hvíta økið

JAN MULLER



Suilven fundið vestan fyri Hetland er sera kærkomið og við hesum hava BP og Shell gjørt hattrick vestan fyri Hetland, og tað gevur okkum góðar vónir um enn fleiri fund

Hetta sigur bretski orkumálaráðharrin Lord Fraser í eini viðmerking til tíðindini um, at BP og Shell hava gjørt enn eitt stórt oljufund nærhendis føroyska markinum. Frammanundan hava feløgini funnið Foinaven og Schiehallion keldurnar.

Sum eitt úrslit av hesum fundinum hava bretskir myndugleikar gjørt av at kanna sær - designera tveir teigar í Hvíta økinum og bjóða teir út til oljufeløgini sum skjótast.

Hetta er rættiliga óvanlig mannagongd, tí tað tekur oftani drúgva tíð frá tí, at tú fyrireikar eitt útbjóðingarumfar til loyvi verða givin. Men av tí, at nýggju teigarnir tykjast so áhugaverdir, og at tað í grannalagnum eru funnar triggjar stórar oljukeldur, siggja bretsku myndugleikarnir tekin til, at oljufeløgini sleppa skjótari í gongd enn vanligt er.

Tað hevur nevniliga vist seg ávís misnøgd hjá onkrum oljufeløgum við útlitini vestan fyri Hetland, nú bert tvey fund eru gjørd í nógv ár. Tí kemur hetta seinasta fundið sera væl við - ikki minst hjá myndugleikunum, sum tekin siggja, at oljufeløgini halda fram og skunda undir leitingina vestan fyri Hetland.

**Eggjar**

Lord Fraser sigur í eini viðmerking til nýggjasta fundið, at tað eggjar bæði myndugleikum og ídnaðinum til at skunda undir leitingina vestan fyri Hetland. Hann heldur, at hetta seinasta fundið bert er eitt tekin um, at tað kunnu liggja enn fleiri oljukeldur fjaldar í undirgrundini og klárar til at uppdaga.

Bretsku myndugleikarnir vilja við hesum hava oljufeløgini at gera skjótt av og søkja um komandi loyvini í nýggju teigunum. Tey feløg, sum koma við teimum bestu uppskotunum til leiting í økinum, skulu sleppa í gongd sum skjótast.

Designeringin av teimum báðum teigunum 204/14 og 204/15 varð gjørd av einum sokallaðum „Order in Council". Økið er ikki partur av einum føroyskum kravi í sambandi við framhaldandi samráðingarnar um ásetan av marki millum Føroyar og Bretland stendur í tíðindaskrivi frá DTI.

DESIGNATION OF BLOCKS 204/14 AND 204/15




*Kortið, sum DTI - bretska handils- og ídnaðarmálaráðið hevur latið almannakunngera í sambandi við nýggju designeringarnar í Hvíta økinum. Svarta strika er fiskimarkið*




*Suilven oljukeldan, sum BP hevur funnið, liggur á sjálvum markinum til grannateigin, ið higartil hevur verið partur av Hvíta økinum (tvs. øki, sum hvørki føroyingar ella breta hava gjørt krav uppá) men bretar nú hava kannað sær. Hetta eru teir noyddir til, um teir skulu til at troyta nýggju kelduna*

*Paul Nicolopulo, limur í bretsku samráðingarnevndini:*

# Hava kunnað føroyingar um nýggja stigið

JAN MULLE

Millum áhoyrararnar á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum er eisini Paul Nicolopulo, sum starvast sum fyrsti skrivari á politisku deildini á bretsku sendistovuni í Keypmannahavn.

Hann er eisini limur í bretsku nevndini, sum samráðist við føroyingar um markið. Sosialurin spurdi hann, um bretska avgerðin at kanna sær nýggj umráði í tí Hvíta økinum, ikki er ein provokatión móti føroyingum, nú samráðingarnar verða tiknar uppattur!

-Vit hava kunnað bæði føroyingar og danir um designeringina, soleiðis sum vit eiga, tá talan er um øki, sum liggja tætt upp at einum marki, sum ikki er endaliga ásett

Poul Nicolopulo sigur, at føroyingar hava ikki sett seg upp ímóti hesi designeringini. Hann heldur, at eru føroyingar ímóti hesi avgerð, so hevði føroyski samráðingarleiðarin, sum er vorðin kunnaður um málið, havt gjørt tí bretska samráðingarleiðaranum hetta greitt. Men tað hevur hann so ikki gjørt

Poul Nicolopulo heldur annars, at tað er umráðandi at gera sær greitt, at talan er ikki um eina marknaósemju millum føroyingar og bretar, soleiðis hann longu hevur hoyrt fleiri føroyingar nevna tað á oljuráðstevnuni

-Tað snýr seg eina samráðingarstøðu

Hann vísir annars á, at bretar á fundinum tann 2. apríl fara at koma við einum útspæli, sum er eitt svar uppá føroyska útspælið á fundinum í mai í fjør.

